

## Bendtner er flúgvandi

Danski álosspælarin Nicklas Bendtner hevur fingið rættiligt gjøgnumbrot í enska felagnum Birmingham. 18 ára gamli Bendtner er sáttmálabundin við Arsenal, men felagið hevur leigað danska framherjan til Birmingham í hesum kappingarárinum. Brimingham flutti niður í næstbestu deildina í summar, men nú er liðið aftur á veg í Premier League. Ein orsøk til tað er Nicklas Bendtner, sum hevur skotið átta mál fyri felagið og er millum bestu málskjúttarnar í deildini.

## Avgerandi dystir í Champions League

Týskvøldið og mikukvøldið verða seinastu dystirnir í bólkaspælinum í Champions League spældir. Átta dystir verða spældir hvørt av kvøldunum. Í fleiri av bólkunum er avgerðin um, hvør fer víðari í kappingini, longu fallin, men í fleiri bólkum er eisini stórur spenningur um, hvørji lið koma víðari. Ein av bólkunum, har spenningurin er stórur, er hjá Barcelona, sum má vinna seinasta dystin ímóti Werder Bremen fyri at koma víðari saman við Chelsea.

TB-ÍF 0-3 (22-25, 27-29, 20-25)

# ÍF vann í Trongisvági

**ÍF gav TB teirra fyrsta tap á heimavølli í ár, tá tær vunnu toppdystin í meistaradeildini hjá kvinnum í Trongisvági sunnudagin**

KVINNUFLOGBÒLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Lagt var upp til satt brak í oddinum av meistaradeildini hjá kvinnum, tá TB tók ímóti ÍF í Trongisvági. Undan dystinum lógu bæði liðini jøvn á fremstu rók við 12 stigum, og tí kundi vinnarin leggja seg á odda í meistaradeildini hjá kvinnum.

Gongdin hjá hesum báðum liðunum hevur verið heldur øvugt síðstu vikurnar. Síðsta dyst hølvaði TB oddaliðið, Drátt, av suðuri í Trongisvági, og í sama umfarið bleiv ÍF hølva av á heimavølli ímóti SÍ. Tí kundi kanska roknast við, at TB fór at vera oman á í dystinum sunnudagin. Men so bleiv ikki.

### ÍF legði hart út

Tað vóru nevniliga gestirnir úr Fuglafirði, sum løgdu betur fyri. Tað tóktist, sum tær høvdu nakað at prógva eftir ósigurin á heimavølli síðsta vikuskiftið. Munurin á liðunum var ikki stórur í fyrsta setti, men ÍF var heldur drúgvari. At enda megnaðu kvinnurnar hjá ÍF at toga seg fram við TB, og fyrsta sett endaði við 22-25 sigri til ÍF.

Var fyrsta settið spennandi, so bleiv annað settið ein sannur gysari. Bæði liðini stríddust manniliga alt settið, og munurin á liðunum var at kalla eingin. Liðini máttu spæla væl forbí tey 25 stigini, áðrenn ein vinnari bleiv funnin, og enn einaferð megnaðu gestirnir frá ÍF at draga longra stráðið. Tær vunnu annað sett 27-29, og nú sá ikki gott út hjá TB, sum ongan dyst hevði tapt á heimavølli í ár undan hesum dystinum.

Hetta skuldi tó ikki vera dagurin hjá TB. Í triðja setti var ÍF enn einaferð oman á, og í hesum settinum var munurin størri enn í teimum báðum undanfarnu settunum. ÍF megnaði nevniliga at vinna tiðja sett 20-25, og sostatt vunnu tær dystin 0-3.

Við sigrinum hevur ÍF lagt seg á odda saman við Drátti, meðan TB misti eitt fet í oddastríðnum.



*TB var ósigrað í heimavølli undan hesum dystinum. Men ÍF vísti við einum 0-3 sigri, at TB kann vinnast í Trongisvági.*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

Mjølnir-SÍ 3-2 (25-9, 17-25, 17-25, 26-24, 15-11)

# Mjølnir heldur fyrsta plássi

**Mjølnir vann tepran sigur á heimavølli í meistaradeildini hjá monnum, tá teir møttu botnliðnum, SÍ. Leingi sá tó út til, at SÍ kundi fara at vinna dystin.**

MANSFLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Bert ein dystur var á skránni í meistaradeildini hjá monnum í vikuskiftinum. Her tók oddaliðið, Mjølnir, ímóti SÍ, sum liggur á aftasta plássi í bestu mansdeildini. Gongdin hjá Mjølni hevur verið stak góð í seinastuni, og undan hesum dystinum høvdu teir vunnið fýra dystir á rað. Hjá SÍ sær hinvegin ikki so gott út. Teir hava nevniliga bert vunnið ein dyst, men síðstu dystirnar hava teir fleiri ferðir verið nær við.

Mjølnir legði tó betri fyri í heimadystinum ímóti SÍ. Í fyrsta setti var snøgt sagt klassamunur, og her hevði SÍ einki at skula hava sagt. Mjølnir vann heili 25-9, og nú lá eitt sorl í luftini.

### SÍ svaraði aftur

Var nakar, sum væntaði, at Mjølnir nú bara fór at hølva SÍ av, so fóru tey øll skeiv. SÍ kom skjótt yvir keðiligu byrjanina, og í øðrum setti vóru teir klárt oman á. Mjølnir fekk slett ikki gongd á sama spælið, sum í fyrsta setti, og hetta gjørdi SÍ sær dælt av. Sørvingarnir megnaðu at vinna annað settið 17-25.

Gongdin í triðja settið var júst tann sama. Enn einaferð var SÍ oman á, og enn einaferð megnaðu sørvingarnir at vinna 17-25. Nú høvdu teir vent dystinum, og knappliga vóru teir á odda 1-2.

### Mjølnir dró longra stráðið

Nú sá ikki gott út hjá oddaliðnum, og nú skuldu teir vinna síðstu tvey settini. Fjórða settið var sera javnt. Her fylgdust liðini at kalla allan vegin, men at enda eydnaðist Mjølni at draga longra stráðið. Teir vunnu hetta settið tepurt 26-24, so nú skuldi javnbrótari til.

Her legði Mjølnir betri fyri, og teir vóru tóktust vera heldur betri enn SÍ hetta síðsta settið. Mjølnir megnaði eisini at vinna síðsta sett 15-11, og sostatt kláraðu teir at venda einum hótandi tapi til ein týdningarmiklan sigur.

Mjølnir-SÍ 0-3 (21-25, 23-25, 16-25)

# SÍ nærkast oddinum

**SÍ vann tryggan sigur í meistaradeildini hjá kvinnum, tá tær vitjaðu hja Mjølni. Við sigrinum eru tær nú heilt nær oddinum.**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Leygardagin var dystur í millum topp og botn í meistaradeildini hjá kvinnum, tá Mjølnir tók ímóti SÍ. Gongdin hjá SÍ hevur verið sera góð síðstu dystirnar, og tær hava støðugt hála inn á oddaliðini. Hjá Mjølni hevur eisini gingið hampiligt síðstu dystirnar, men undan dystinum mátti SÍ metast at vera favorittur.

SÍ fekk eisini betru byrjanina upp á dystin. Sjálvt um munurin ikki var stórur í fyrsta setti, so megnaðu sørvágskvinnur at vinna hetta 21-25.

Var fyrsta settið javnt, so var annað settið enn javnari. Her var at kala eingin munur á liðunum, og settið kundi fari báðar vegir. At enda var SÍ tó enn einaferð oman á, og úrslitið av øðrum setti gjørdist 23-25 til SÍ.

Nú tóktist Mjølnir missa móti, og í triðja setti var stórur munur. Her var SÍ betra liðið allan vegin, og hetta settið megnaðu tær eisini at vinna 16-25. Við sigrinum heldur SÍ góðu gondini, og nú eru bert tvey stig upp til oddaliðini.